Sosialurin

...títt vinnublað






VINNAN

VINNU- OG HANDILSTÍÐINDI Í SOSIALINUM

# Norskt skipasmíð á veg niður í ein aldudal

**Hóast norsku skipasmiðjurnar hava bíleggingar fyri heilar 65 milliardir krónur, er vinnan á veg niður í ein aldudal**

SKIPASMÍÐ

*Árni Joensen*
*arni@sosialurin.fo*




*Fíggjarkreppan fer at gera tað truplari at fáa fígging til at byggja skip, og kravið til eginpeningin verður hert, væntar Gunvor Ulstein*
*Mynd: Ulstein Verft*

Bíleggingarbøkurnar á teimum norsku skipasmiðjurnar eru ikki tómar, minni enn so, men ein sannroynd er tað, at í ár er tað vorðið alsamt longri og longri ímillum bíleggingarnar. Eitt annað er, at tað er minni enn so vist, at øll tey bíløgdu skipini verða smíðað, tí tað kann meiri enn so henda, at byggiharrin fær ikki ta neyðugu fíggingina, soleiðis sum umstøðurnar eru broyttar.

- Vit hava fingið nøkur dimm skýggj upp á luftina, men vit velja at halda okkum til tað jaliga. Næsta ár skulu skipasmiðjurnar lata skip fyri 25 milliardir krónur, í 2010 lata tær skip fyri 22 milliardir og í 2011 fyri 7 milliardir krónur. Hetta eru teir sáttmálarnir, sum eru komnir í rættlag, sigur Egil Holland, stjóri í norska ídnaðarfelagnum, við NTB.

Egil Holland vísir á, at norsku skipasmiðjurnar hava ongantíð havt so nógvar bíleggingar áður, og tí verður fallið niður í aldudalin ikki so ógvusligt tey fyrstu árini, sigur hann.

### Harðari treytir

Ulstein-skipasmiðjan er ein av teimum stóru í Noregi við umleið 350 arbeiðsplássum. Umsetningurin í ár verður um tríggjar milliardir krónur, og hóast tað er væl meiri enn í fjør, ásannar forstjórin, Gunvor Ulstein, at tað er longri ímillum, at nakað nýtt kemur í bíleggingarbókina.

– Enn vita vit ikki, hvussu fíggjarkreppan fer at ávirka virksemi okkara, men tað verður ivaleyst truplari at fáa fígging til skip, samstundis sum kravið um eginpening verður hert, sigur hon við NTB. Ulstein-skipasmiðjan hevur í løtuni bíleggingar fyri sjey milliardir krónur og arbeiði til nakað út í 2011, men stjórin væntar, at ferðin niður í aldudalin fer at byrja í 2010.

Enn hava ongar uppsagnir við í skipasmiðjuídnaðinum, men Jan Helge Dyngeland, talsmaður hjá starvsfólkunum á Ulstein-skipasmiðjuni, ásannar, at tað kann koma.

- Vit hava sæð uppsagnir í byggivinmnuni og tænastuvinnugreinunum, og vit hava ikki gloymt, hvussu stórar trupulleikar smíðasmíðið hevði fyri bara fáum árum síðani, sigur hann við NTB.

**Demich P/F Tórshavn**
Postboks 378 - Stiðjagøta 2
FO-110 Tórshavn
Telefon +298 309 310
demich@demich.fo

**Demich P/F Vágur**
Á Marknoyri
FO-900 Vágur
Telefon +298 37 35 35
demich@demich.fo

**Demich P/F Runavík**
Heiðavegur 80
FO-610 Saltangará
Telefon +298 445500
demich@demich.fo

VØLUND VARMETEKNIK





HITI • VENTILATIÓN • SANITET

Vit hava røttu loysnina til júst tín tørv.

Umhvørvisvinarlig orka við hitapumpu frá Demich

demich